

# Hundasey

**Á Eiði býr eitt lamb, sum eitur Lambi. Foreldrini eru Veljko og Velika Gjorgjieska úr Makedonia, og eigarin eitur Daniel Magnus. Lambi er eitt húsdjór, men í nógv størri mun, enn vit eru von við í seyðahaldi. Tí Lambi ber seg at sum hundur**









HEIMALAMB

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eitt eiðisfólk kemur gangandi á vaglinum á Eiði. Brádliga koma ein maður, ein kvinna, ein lítil drongur og so eitt lítið lamb. Lambi gongur alla tíðina í hølunum á manninum. Tey síggja út sum, at hetta er tað vanligasta í heiminum. Men tað heldur eiðisfólkið ikki. Er hatta ein seyðahundur ella ein hundaseyður? Er hatta ein hundur í kroppinum hjá seyði, ella ein seyður, sum ger sum ein hundur?

Hetta er nakað flestu eiðisfólk hava upplivað seinastu mánaðirnar, tá Lambi hevur gingið túr saman við familjuni hjá sær. Makedonsku Veljko og Velika og soninum, Daniels Magnus Gjorgieski, sum altíð hevur búð í Føroyum. Hansara støða varð umrødd í Degi og Viku hjá Kringvarpinum í gjár.

- Vit munnu vera ein makedonsk familja við einum føroyskum lambi. Men Lambið er av skotskari ætt, og tí hevur tað borið til at læra tað at spæla fótbólt og at ganga túr saman við okkum. Tað er sum hundarnir í Skotlandi. Øgiliga gløgt. Og eg rokni ikki við, at tað ber til at læra villu føroysku seyðirnar at gera hesi tingini, greiðir Veljko Gjorgjieski, sum arbeiðir fyri Tórshavnar kommunu í Kollafirði, frá.

## »Lambi«

Hetta lítla lambi, sum í løtuni býr við byrgingina uppi á vatni, sum SEV gjørdi fyri nógvum árum síðani. Hevur næstan frá fyrsta degi itið Lambi.

- Vit vistu at ungarnir hjá seyði eita lamb á føroyskum, og tá Lambi er eitt vanligt mannfólkanavn í Makedonia, so hildu vit tað vera púra náttúrligt at kalla tað fyri Lambi, sigur Veljko.

Á hálsinum á Lambi eru hundatekin... Seyðatekin?, har greitt verður frá, at hesin seyður eitur Lambi, at tað er Daniel Magnus Gjorgjieski, sum eigur seg, og at tað býr í Heimtúni nummar 7 á Eiði.

## Betri enn hundur

Síðan Lambi kom til Eiðis, hevur tað verið undir venjing hvønn einasta dag, og tað hevur við sær, at tað kemur tá mann rópar og so dugir tað eisini at spæla bólt.

- Eg royndi at læra tað okkurt hvønn einasta dag eftir arbeiðstíð. Eg haldi eisini, at Lambi er betri enn nakar hundur, tí tað skikkar sær øgiliga væl, sigur Veljko.

Tað er eisini soleiðis, at fer Veljko ella Daniel Magnus at renna, so fylgir Lambi við. Júst sum um, familjan Gjorgjieski, var seyðafylgið hjá Lambi. Men tað er eisini eyðsýnt, at tað er Veljko, sum verður sæddur sum harrin í flokkinum.

## Fylgir Veljko

Tað hava eisini verið dagar, har tað ikki hevur borið so væl til hjá Veljko at vera saman við hundaseyðinum, og tá hevur Velika roynt seg sum seyðavenjara, umframt at hava gingið úti við tí.

- Eg fór gangandi í bygdini, men so rýmdi tað bara. Ein maður, sum hevði fingið eitt sindur upp í høvdið bleiv við at rópa. »Far til mammu. Far til mammu.« so tað ber væl til at siga, at Lambi lurtar betur eftir manni mínum enn mær, sigur Velika, sum til fyri kortum hevur starvast á Norðís á Eiði.

## Flutt heimani

Síðan 17. apríl hevur Lambi búð á Eiði, men fyri kortum flutti tað heimani.

- Tað búði inni hjá okkum, men tað bleiv ov stórt, og so bar ikki ordiliga til at hava tað gangandi, greiðir Veljko frá.

So nú gongur Lambi við Myllánna, sum rennir úr Eiðisvatni.

Veljko leggur afturat, at tey hava hugsað um, hvussu tey skulu gera við framtíðina hjá Lambi.

- Vit fara at geva tí mjølk fram til ólavsøku. So fara vit at geva tí gras, so Lambi kann gerast ein stórur og raskur seyður, sum aðrir seyðir veruliga kunnu síggja upp til, sigur Veljko og flennir.

## Lambi!

Nú Lambi er flutt úr heiminum á Eiði, sum Veljko sjálvur hevur sett í stand fyri familjuna, so fer onkur í familjuni niðan at geva einar tríggjar ferðir um dagin.

- Tað er løgi. Lambi gongur á einum stykki, har ein rúgva av seyði er. Men tað gongur altíð ovast á stykkinum, óansæð um aðrir seyðir eru har ella ikki. Onkuntíð, so seti eg bilin niðri við vegin, og so rópi eg bara, og so kemur tað tuskandi omaneftir, greiðir hann frá.

Tað eru nakrir hundrað metrar frá ovast til niðast á